## Washington Post sparir

Fíggjarkreppan hevur fingið tað stóra amerikanska blaðið Washington Post at repa seglini, og í gjár kunngjørdi leiðslan, at hon hevur gjørt av at steingja tær seinastu lokalu deildirnar uttan fyri sjálvan høvuðsstaðin. Talan er um deildirnar í Chicago, Los Angeles og New York, sum lata aftur gamlaárskvøld. Washington Post er tað fimmtistørsta dagblaðið í USA. Vanligar dagar kemur blaðið úr í 582.000 eintøkum, men sunnudag er upplagið oman fyri 800.000. Í seinastuni hava fleiri amerikanskir fjølmiðlar sagt fólki úr starvi sum lið í at spara rakstrarútreiðslur, skrivar AP úr Washington.




## Álopsmenn ákærdir

Ákæruvaldið í Pakistan hevur ákært sjey menn í sambandi við tað blóðuga yvirgangsálopið í indiska býnum Mumbai fyri einum árti síðani. Allir nokta seg sekar. Myndugleikarnir siga, at teir sjey hava tilknýti til tann víðgongda felagsskapin Lashkar-e-Taiba. Menninir hava sitiði varðhaldi í fleiri mánaðir, og millum teirra er Zakiur Rehman Lakhvi, sum sambært pakistonsku myndugleikunum var høvuðsmaðurin aftan fyri álopið á tvey gistingarhús og eina jarnbreytarstøð í Mumbai, og sum kostaði 166 mannalív.

# - Vit vilja geva vinnulívinum eitt betri grundarlag



**Hósdagin 3. desember kemur út eitt nýtt vinnutíðarrit, sum ætlandi skal geva føroyskum vinnulívi eitt betri grundarlag at taka sínar avgerðir á. - Blaðið verður skrivað av freelance-journalistum og fólki, sum hava áhuga og innlit í viðurskiftini. Málið verður at fáa teir relevantu vinklarnar fram, segði Páll Isholm í síni framløgu á vinnutinginum hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag**




*- Vit fara at royna at skapa eitt vinnutíðarrit, sum í breiðari merking kemur at viðgera føroyskt vinnulív, bæði djúpt, men eisini breitt. Blaðið skal verða fjølbroytt og áhugavert, segði Páll Isholm, sum verður blaðstjóri á Vinnu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

VINNUTING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á vinnutinginum, sum Eysturoyar Vinnulívsfelag helt á Vónini í Fuglafirði seinasta fríggjadag, greiddi Páll Isholm, deildarstjóri og komandi blaðstjóri á vinnublaðnum Vinna, frá hesi verkætlan.

Tað verður Sansir, sum kemur at seta blaðið upp og kemur at standa fyri útgávuni. Tað er eisini Sansir, sum gevur út blaðið Kvinna, men hetta verður so altso Vinna í staðin fyri – og sjálvsagt við heilt øðrum innihaldi.

Taka vit Kvinnu sum sera snotuligt kvinnublað, er lítið at ivast í, at blaðið Vinna í útsjónd verður vakurt og kemur at fella í eyguni sum tíðarrit.

Í síni fraløgu um hesa nýggju verkætlan, sum ætlandi verður sjósett hósdagin, 3. desember, segði Páll Isholm, at blaðið ætlandi skal geva vinnulívinum eitt betri grundarlag at taka sínar avgerðir á.

Hann segði, at blaðið eisini fer at leggja seg eftir at geva føroyingum eitt betri forstáilsi fyri, hvat vinnulív í síni heild er.

- Hetta verður eitt vinnutíðarrit, sum ætlandi skal koma níggju ferðir um árið, og støddin á blaðnum verður eitt sindur minni enn A4.

### Breitt og djúpt

Páll Isholm segði, at málið er at skapa eitt spennandi og eitt snotuligt grafiskt blað, men hetta verður ikki eitt myndablað, sum hann tók til.

- Vit fara at royna at skapa eitt blað, sum í breiðari merking kemur at viðgera føroyskt vinnulív, bæði djúpt, men eisini breitt. Blaðið skal verða fjølbroytt og áhugavert.

Spurdur, hvussu stórt eitt slíkt blað verður, segði hann seg vænta, at talan helst verður um einar 70-90 síður hvørja ferð.

Hann segði, at Vinna fer at kunna keypast í leysasølu, og møguleiki verður sjálsagt eisini at tekna blaðhald.

- Vit fara at senda tey fyrstu trý bløðini ókeypis út til eitt nú virkisleiðslur og borgarstjórar, men tað, sum í longdini verður berandi fyri blaðið, verður søla av blað og lýsingum.

Páll segði seg vóna og vænta, at teimum fer at eydnast at skapa eitt gott blað, sum hongur saman fíggjarliga.

- Umframt at hava freelance-journalistar at skriva greinar, er ætlanin eisini, at fólk, sum hava stórt innlit í ymiskar vinnugreinar og í vinnu sum heild fara at skriva sergreinar. Vit fara soleiðis at heita á fólk um at skriva. Harumframt verður pláss fyri ymiskum meiningum um viðurskiftini.

Hann endurtók, at Vinnan ætlandi skal raka breitt, sum

hann tók til, og málið er eisini at røkka víða um landið geografiskt og víða um í ymiskum vinnugreinum.



*Hjalmar Petersen, stjóri, var bæði vertur og hevði framløgu um virksemið hjá Vónini, Tummas Eliasen, stjóri í Lív, greiddi frá eftirlønartryggingum og um pensjónskapital í vinnulívi – og Páll Isholm, komandi blaðstjóri, greiddi frá vinnutíðarritinum Vinna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Álítandi tíðindi

Meðan Páll Isholm hevði sína framløgu, tók eisini orðaskifti seg upp um eitt nú fíggjarligar greiningar av feløgum, sum reka vinnu.

Her vísti Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost á, hvussu umráðandi er, at slíkar greiningar eru rættar og eftirfarandi, um blaðið kemur at hava slíkar við.

- Eg havi lisið greiningar, sum eru prentaðar, har lítið høpi er í, og tá geva tær onga sum helst meining, segði hann.

Páll segði, at um blaðið fer at hava greiningar, er sjálvandi ógvuliga umráðandi, at hesar fyri tað fyrsta eru viðkomandi og eftirfarandi.

Ymiskir spurningar komu til umrøðu, meðan komandi blaðstjórin hevði sína framløgu, og eitt nú vísti Olaf Olsen, fyrrverandi reiðari á, hvussu undarligur samanhangurin kann vera í eitt nú